FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-099_1.2
dags. 13-09-2010

Vinnumálaráðið
Att: Annika Petersen

Teldupostur:

Viðv.: Tygara mál um standard hýruvognsreglugerð

Felagið hevur 24/06-2010 móttikið uppskot til kunngerð um standard hýruvognsreglugerð til hoyringar.

Uppskotið er viðgjørt á stýrisfundi felagsins 10/08-2010 og hevur felagið hesar viðmerkingar.

Sambært § 2, stk. 1, verður lagt upp til, at loyvi bert er at søkja hýru í kommununi har loyvi er givið.

Hetta hevur við sær, at hýruvognur kann taka túr úr "heimakommununi" til aðra kommunu, men kann ikki taka nýggjan túr heimaftur. Tvs. at kundin má finna sær annan lokalan hýruvogn, at koyra seg heimaftur, meðan fyrsti hýruvognurin koyrir tómur heimaftur sama veg.

Hetta er ikki nøktandi fyri hvørki kundan ella lokala hýruvognsføraran. Felagið metir í hesum sambandi, tað vera sjálvsagt, at hýruvognur kann taka túr á veg heimaftur og at hýruvognar annars kunnu søkja hýru har kundarnir eru, eisini uttanfyri kommunumark.

Sambært § 3, um loyvi, verður ásett, at loyvishavi skal vera heimahoyrandi í Føroyum. Ongin krøv eru um, at loyvishavi skal vera heimahoyrandi í sjálvari loyviskommununi. Sostatt er sum meginregla møguligt hjá persónum, at søkja og hava hýruvognsloyvi í fleiri, ella øllum, kommunum.

Hví so ikki geva hýruvognsførarum loyvi frítt at søkja sær hýru í Føroyum og leggja umsitingina av teimum í § 4, 5, 6, 7, 8 og 9 undir ein landsstovn, t.d. Akstovuna, at umsita, heldur enn at leggja hettar til kommunurnar?

Hetta hevði havt við sær eina bíligari skipan, við einari meginumsiting, heldur enn fleiri kommunalum, har hýruvognsførarar kunnu søkja sær hýru á einum fríum marknaði, í øllum landinum.

Sambært § 5 er ásett, at støðir skulu hava bil í rakstri alt samdøgrið. Hetta kann vísa seg trupult hjá minni støðum og lættari hjá størri støðum. Ein trupulleiki av hesum kravi

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

kann verða, at vit fáa nakrar fáar stórar støðir, við fleiri bilum og harvið lítla kapping á hýruvognsøkinum. Støðirnar koma at liggja í størru býunum í landinum og minnu bygdirnar verða við sviðið soð.

Ein loysn á hesum er at minka kravið um at hava bil tøkan alt samdøgrið, til at støðirnar sjálvar gera hettar av. Á hendan hátt kunnu vit fáa fleiri støðir, størri og smáar, um landið.

fyri felagið

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo